Bretska stjórnin løgd undir líkasælu í spurninginum um oljudálking

Bretlandi er tað handils- og idnaðarmálaráðið, sum skal skipa fyri, at dálkingin av oljuvirkseminum í Norðsjónum ikki er so stór. Nógv, eitt nú umhvørvisfelagsskapir, halda tað vera løgið, at tað ikki er umhvørvismálaráðið, sum skal taka sær av hesum.

EMIL L. JACOBSEN

(REUTER) Bretska Labour-stjórnin legði undir valstriðnum fyrr í ár dent á sín vinnulivsvinarliga handilspolitikk og sínar «grønu» dygdir.

Men nú stendur stjórnin fyri skotum frá umhvørvisfelagsskapum, sum halda, at hon arbeiðir ov tætt saman við norðsjóvaroljufeløgum.

Umhvørvisfólk vilja vera við, at tvey brøv, sum av ovart eru komin fram í ljósið, visa, at Labour kanska ikki fer at standa við sitt orð um at arbeiða ímóti oljudálking.

Labour kom til valdið í mai mánaði við einum stórum meiriluta í tinginum. Flokkurin segði, at stjórnin fór at vera meira vinarliga sinnað mótvegis vinnulivinum, enn Konservativi Flokkurin hevði verið. Eisini skuldi Labour gera meira við umhvørvið.

Aðrenn valið róstu umhvørvisfelagsskapirnir Labour fyri at hava sagt, at oljudálking elvdi til «livfrøðiligar oyðimerkur» í Norðsjónum og fyri at hava lovað at vera strangari móti oljufeløgunum, sum dálka.

Men nú siga umhvørvisfelagsskapirnir, at síðani valið heldur handils- og idnaðarmálaráðið (DTI) fram við at samstarva við oljufeløgini. Í felag royna tey at fjala, hvussu stór dálkingin er av oljuframleiðslu. Eisini roynir stjórnin at køva eina herferð hjá Greenpeace móti oljuvinnu í Atlantshavinum.

Felagsskapirnir róstu kortini umhvørvismálaráðharranum Michael Meacher fyri hansara avgerð um at seta harðari altjóða reglur um dumping í sjónum í verk í Bretlandi. Hesar reglur kunnu gera tað ólógligt at søkkja gamlar boripallar niður í havið í so at siga øllum førum.

Avgerðin hjá Meacher gongur ímóti gamla politikkinum hjá Bretlandi um, at tað skal vera lógligt at dumpa gamlar boripallar í havið.

DTI í parti við oljuídnaðinum

Umhvørvisfelagsskapirnir eru ónøgdir við, at tað framvegis er DTI og ikki umhvørvis- og flutningsmálaráðið, sum hevur hetta málið um hendi.

Eisini er ónøgd við háttin, sum DTI tekur sær av trupulleikanum uppá.

– DTI er í parti við oljuidnaðinum, og nógv embætisfólk arbeiða ov tætt saman við idnaðinum, sigur Simon Reddy frá Greenpeace.

– Vit vilja hava DTI at sleppa sínum umhvørviskyldum – Tað, at DTI hevur so nógv vald, er vamlisligt, og tað ger, at Michael Meacher ikki kann seta tað í verk, hann fegin vil, sigur Simon Reddy.

Hóast ónøgdina hjá umhvørvisfólkunum er lítið, sum bendir á, at ábyrgdin fyri at hava eftirlit við oljudálkingini verður tikin frá DTI.

Varaumhvørvismálaráðharrin Angela Eagle segði í juli, at stjórnin «ikki hevur nøkur uppskot um broytingar» í sambandi við ábyrgdarskið hjá DTI.

Tá Reuter spurdi um trupulleikar við dálking í Norðsjónum, sýtti ein talsmaður hjá umhvørvismálaráðnum fyri at svara og vísti til DTI.

Simon Reddy frá Greenpeace segði seg vera «sera vónsviknan» av orðunum hjá Angela Eagle.

Men hann legði aftur at, at Meacher «veit, at undir gomlu stjórnini vóru viðurskiftini hja oljufeløgunum ov lagalig».

– Men hann má striðast við eitt DTI, sum ikki er so hugað fyri at siggja, at neyðugt er við broytingum – men í løtuni hava vit enn vónina, sigur Reddy.

Mugu ikki fáa pláss í fjølmiðlunum

Sum prógv um tettu viðurskiftini millum DTI og oljufeløgini nevnir Greenpeace eitt bræv frá orkumálaráðharranum John Battle, har hann sigur, at tær ymsu ráðharraskrivstovurnar eru komnar ásamt um eina strategi at «svara øllum Greenpeace-virksemi á lagaligan hátt, so umhvørvisfelagsskapurin ikki kann gera sær dælt av fjølmiðlunum.»

«Stjórnin hevur arbeitt hart fyri ikki at føða Greenpeace-maskinuna», skrivar John Battle í bræverinum til fyrrverandi konservativa ráðharran Richard Page.

Í bræverinum, sum kom fyri dagsins ljós í september, stendur, at gjøgnum alla Greenpeace-herferðina móti oljuleitingini vestan fyri Hetland «hava stjórnin og idnaðurin havt tætt samband» og hava «vælevdnað forðað Greenpeace í at fingið ókeypis umrøðu.»

Greenpeace sigur, at bræverið vísir, at stjórnin hevur arbeitt fyri afturlatnum hurðum fyri at gera eina felags strategi fyri at kuga arbeiðið hja umhvørvisfelagsskapunum.

Hóttir lívið í havinum

Men dálkar oljuleitingin í Norðsjónum so illa, sum Greenpeace og aðrir umhvørvisfelagsskapir vilja vera við?

Oljufeløgini siga, at tað ger hon ikki.

Men summir havfrøðingar eru ikki samdir.

John Gray, sum er professari havlivfrøði á universitetinum í Oslo, sigur, at bretski politikkurin hóttir lívið í havinum.

Hann sigur, at Noreg beinanvegin setti fyribyrgandi tiltøk í verk, tá funnið varð útav, at boringin elvdi til skaða á vistfrøðina í havinum nærhendis staðnum, har borað varð.

Men Bretland hevur ikki tikið nøkur tilík stig.

John Gray heldur tað «als ikki vera til at góðtaka», at tað er DTI heldur enn umhvørvismálaráðið, sum hevur ábyrgdina av at halda eyga við oljudálkingina í Norðsjónum.

– Bretland ber seg ikki at sum nakað annað land í Europa, sum eg veit um, sigur John Gray.



Í Bretlandi er tað handils- og idnaðarmálaráðið, sum hevur eftirlit við dálkingini av oljuvirkseminum í Norðsjónum. Hetta halda nógv, millum annað umhvørvisfelagsskapir, vera løgið. Teir halda, at tað heldur átti at verið umhvørvismálaráðið, sum tók sær av hesum málsøkinum

Noreg fær nýggja stjórn í næstu viku

Mánadagin fer norski forsætismálaráðharrin Thorbjørn Jagland at heita á Harald kong um at loysa seg úr starvi. Nýggjur stjórnarleiðari í Noreg verður allarhelst Kjell Magne Bondevik úr Kristiliga Fólkaflokkinum. Annars er ætlanin, at núverandi arbeiðarastjórnin skal vera sitandi, til Bondevik hevur mannað nýggju stjórnina.

EMIL L. JACOBSEN

(REUTER) Norski forsætismálaráðharrin Thorbjørn Jagland fer váentandi at siga seg úr starvinum mánadagin, so ein moderat samgonga kann taka við leiðsluni.

Jagland, sum kom til, eftir at Gro Harlem Brundtland tók seg aftur sum forsætismálaráðharri í oktober í fjør, hevur sagt, at hann og stjórnin fara frá, tí Arbeiðaraflokkurin ikki fekk tey 36,9 prosentini, hann vildi hava til stórtingsvalið í seinasta mánaði.

Norska tíðindastovan NTB skrivar, at Jagland fer at handa Haraldi V kongi sína uppsagn mánadagin klokkan 14.00 norska tíð.

Seinni sama dag fer Haraldur kongur at biðja leiðaran av Kristiliga Fólkaflokkinum Kjell Magne Bondevik um at skipa nýggja stjórn.

Stjórnin hevur hildið fram við arbeiðnum eftir valið fyri at leggja figgjarlógaruppskotið fyri 1998 fyri stórtingið.

Figgjarmálaráðharrin Jens Stoltenberg fer á tingsins røðarapall mánadagin klokkan 10.00 norska tíð.

Fer at kunna tingið fyrst

Skrivstovan hjá Thorbjørn Jagland kundi ikki vátta, júst nær Jagland fer at taka seg aftur.

– Forsætismálaráðharrin fer at kunna tingið fyrst, segði talsmaðurin hjá Jagland, Øyvind Østang, við Reuter.

Hann segði, at stjórnin fer at verða sitandi sum ein fyribils stjórn, inntil ein nýggj samgonga og stjórn verður skipað.

Kristiligi Fólkaflokkurin ætlar saman við Miðflokkinum og Venstre at skipa eina moderata minnilutastjórn.

Kjell Magne Bondevik hevur sagt, at hann verður til reiðar at skipa sína stjórn millum triggjar og fýra dagar eftir, at Arbeiðaraflokkurin fer.

Kjell Magne Bondevik er klárur at skipa nýggja stjórn í Noregi

Savnsmynd: REUTER

VIKU tíðindi

Nettoskuldin er burtur um trý ár

Um gjaldsjavnaavlopið heldur fram at vera um 900 mió. kr. komandi árini, so verður nettouttanlandsskuldin komin niður í einki um tvey til trý ár. Almenna skuldin fer tó í mong ár at vera so stór, at lítið pláss verður fyri einum sjálvstøðugum figgjarpolitikki, sigur búskapardeildin í viðmerkingum til figgjarlógina fyri næsta ár.

Støddin á uttanlandsskuldini hevur stóran týdning fyri tær treytir sum verða settar, tá landið og privatar fyrirtøkur taka upp lán í útlondum. Ein stór uttanlandsskuld førir til, at bæði almennni og privati sektorurin mugu læna undir munandi verri treytum, enn annars. Ein fylga av stóru føroysku uttanlandsskuldini er, at ein stórur partur av virðisøkingini í Føroyum má gjaldast til útlond sum rentur og avdráttir. Hervið minkar búskaparliga sjálvræði og møguleikarnir at tillaga búskaparpolitikkin til skiftandi konjunkturviðurskifti.

Síðan 1990 er føroyska nettouttanlandsskuldin minkað munandi. Nettoskuldin, sum við ársenda 1990 var 8,5 mia. kr. var við ársenda í 1996 komin niður á slakar 3,1 mia. kr. Búskapardeildin metir at nettouttanlandsskuldin í ár minkar um 900 mió. kr. og kemur niður á 2,2 mia. kr. við ársenda.

Tann privati parturin av uttanlandsskuldini er niðurgoldin, og í dag eigur privati sektorurin stóra nettoogn uttanlands. Serliga plaseringarnar hjá føroysku peningastovnunum uttanlands hava fört við sær, at privati sektorurin hevur nettoogn uttanlands. Í fjør var nettoognin hjá peningastovnunum uttanlands 2,9 mia. kr. Harumfrumt hava Føroya Lívtrygging og føroyskir pensiónsuppsparar nettoogn uttanlands upp á 1,1 mia. kr. Privati sektorurin annars hevur eina nettoskuld upp á 400 mió. kr.

Almenna skuldin er vaksin nógv síðani 1990. Skuldin er vaksin av storum hallum á figgjarlógini og av bankahjálpingunum 1992-1993. Tann stóra almenna skuldin tyngir rentupostin á figgjarlógini. Landsbankin roknar við, at rentuútreiðslurnar hjá landskassanum í 1998 verða 438 mió. kr. svarandi til 15% av útreiðslum landskassans tilsamans.

Hóast nettouttanlandsskuldin við ársenda í ár væntandi kemur niður á 2,2 mia. kr. togar almenna og privata skuldin hvør sín veg. Meðan landskassin og kommunurnar við ársenda í ár væntandi fara at hava eina skuld upp á ávikavist 5,5 og 0,9 mia. kr. fer tann privati sektorurin undir einum at hava eina nettoogn upp á 4,2 mia. kr. sum síðstu metingarnar frá búskapardeildini í Tinganesi.

50.000 skrubbur um dagin

Einki er so ringt at tað ikki er gott fyri okkurt. Nógva umtalan av óhepnu byrjanini av sjónvarpspælinum «Skrubban» hevði helst við sær, at 100.000 skrubbur vóru útseldar eftir tveimum døgum.

– Kanska var tað tí at feilur var í fyrstu «skrubbuni» at vit fingu so nógv reklamu og seldu so nógvar skrubbur, sigur Tróndur Djurhuus, sjónvarpsjóri.

Skrubbuseðlarnir koma til landið 100.000 hvørja ferð. Tá tær eru upp, fara so tær næstu 100.000 á marknaðin og so framvegis.

Tað kom heilt óvart á sjónvarpið, at áhugin var so stórur fyri skrubbuni, at hon nærum var útseld eftir tveimum døgum – ella 50.000 skrubbur upp á ein dag.

Heldur ikki framleiðarin av skrubbuni hevði roknað við stórari undirtøku, og kundi tískil ikki koma við nýggjum skrubbu-upplagi beinanvegin. Tað mátti bíða til seinni í vikuni.

Ongantíð verið so mong útlendsk skip sum í ár

Fyrstu níggju mánaðirnar í ár hava ikki færri enn 235 útlendsk skip, sum Skipafelagið Føroyar umboðar, vitjað í Føroyum. Serliga hevur tað verið í Nólsoyarfirði, at nakað hevur verið at sæð til hesi mongu skip.

– Tilsamans vóru skipini 274 í tali alt árið í fjør, so nógv bendir á, at vit fara at hava eitt metar í ár, tí nú níggju mánaðir eru farnir, eru vit 34 skip framman fyri somu tíð í fjør, sigur Arni Dam, stjóri á Skipafelagnum Føroyum. Tað er hann, ið hevur mest við útlendsku skipini at gera.

– Verður samanborið við sama tíðarskeið í 1995, so hevdu tá verið 112 skip her, meðan tey fyrstu níggju mánaðirnar í fjør hevdu verið 201 í tali. So her er talan um ein vøkstur upp á 17 prosent, samanborið við í fjør.

Av skipunum, sum hava verið her higartil í ár, eru tey flestu russisk, nevniliga 119 í tali. Síðani hava verið 26 úr Eatlandi, 21 úr Bretlandi og tilsamans 69 skip úr øðrum londum.

Serliga stórt var talið á skipum fyrstu trýggjar mánaðirnar í ár, eins og talið var óvanliga stórt í august mánaði, tá fleiri enn 60 skip umskipaðu á redini í Havn.

Meginparturin av utlendsku skipunum, sum vitja í Føroyum, eru fiskiskip ella skip, sum koma higar í sambandi við umskiping av fiski. Aftur at hesum eru eisini nokk so nógv skip, sum taka fisk frá landi av – eitt nú gulllaks, makrel, sild og fiskaslógv.

Føroyingar kappingarførir

– Vit vóna sjálvandi, at vit yvirhála tølini frá í fjør, tí tað hevur nógv at siga, at vit fáa hesi skipini hendavegin. Fleiri av grannum okkara, eitt nú hetlendingar, eru í øðini um, at vit eru farnir avstað við hesum skipunum, sigur Árni Dam.

– Hesi skip leggja nógvan pening eftir seg, og tá talan er um fremmant gjaldoyra, kemur tað øllum føroyingum til góðar í seinna enda. Tað sigur seg sjálvt, at nógvur peningur kemur til landið, tá eitt av hesum skipum kanska keypir 700 tons av olju og annars provianterar fyri einar 50.000 krónur. Tað er nevniliga heilt vanligt.

Hann sigur eisini, at føroyingar í nógvar mátar eru kappingarførir við grannalondini, og at tað er tí, at tað eydnast at fáa skipini hendavegin. Eitt nú er hvør liturin av olju millum 28 og 40 oyru bíligari enn í Reykjavík og bert eini fimm oyru dýrari enn í Keypmannahavn, so tað veruliga loysir seg hjá útlendsku skipunum at koma til Føroya at avgreiða umskiping og annað.

– Og tá tað kemur til proviantin, so er bert fruktin dýrari enn annar matur í Danmark. Alt hitt fæst bíligari í Føroyum, so meðan vit føroyingar vinna nógvan pening við at taka ímóti hesum skipum, er tað eisini sparing fyri tey, sigur Árni Dam, sum ikki skilir tær føroysku røddir, sum viðhvørt finnast at hesum mongu skipum.

– At fólk gerast ill inn á hesi skip, skilji eg als ikki. Og gangurin frá maskinunum umborð á teimum er ikki verri, enn hann er frá øðrum skipum. Sjálvt skip, sum liggja inni á molanum, halda meira gang enn skipini úti á redini, ið sanniliga ikki órógva nógv, tá hugsað verður um, hvat tey leggja eftir seg.

Júst nú eru fleiri av hesum skipunum, ið plaga at vitja í Føroyum, inni á norsku firðunum, har tey taka móti sild. Nú arbeiðir Skipafelagið Føroyar við at fáa tey hendavegin, tá umskipast skal.

– Tað hevði verið stuttligt, kundu vit sett met í ár í skipatalinum. Og tað skuldi borið til, tí so lítið vantar í hjá okkum longu nú, meðan enn triggir mánaðir eru eftir av árinum, sigur Árni Dam.

Skjótt ber til at gera síni bankaørindi heima í stovuni

Elektron hevur ment eina føroyska heimabankaskipan fyri Føroya Banka og Føroya Sparikassa.

Tað nýggja við hesi skipan er, at brúkarin kemur í eitt on-line samband við bankan, eftir at hava nýtt eil tey loynorð og tøl, sum trygdarskipanin krevur.

Føroya Banki hevði eina lúknandi skipan í samstarvi við BEC fyri vinnulívskundarnar. Men nýggja skipanin er viðkað, og fevnir sostatt eisini um privatkundar.

Bergur í Garði, Føroya Banki, sigur, at ætlanin hevur verið at sett skipanina í gildi fyrr í ár, men hetta er útsett, m.a. vegna sera strongu trygdarkrøvini sum verða sett, tá talan er um teldusamskifti.

Í løtuni verður Internetið roynt sum miðil, men møguleiki verður eisini fyri einum øðrum slag av on-line sambandi, sum tíðin gongur.

– Kundin kann frá síni heimatelduna fara inn at hyggja eftir síni saldo og flyta pening millum egnar konti og yvir á aðrar, sigur Bergur í Garði.

Vinnulívskundin hevur onnur krøv enn tann privati og kann serliga gera nýtslu av skipanini, tá lønir skulu gjaldast.

Í dag hava fyritøkurnar sína egnu skipan og kunnu so antin skriva lønirnar út og geva bankanum tær, sum síðan førir tær inn aftur í sína skipan.

Hetta er dupultarbeiði, sum slepst undan við nýggju heimabankaskipanini.

Ein tílík skipan letur eisini aðrar tænastur til kundan, um ynski er fyri tí. M.a. hvussu er við gjaldoyranum og so framvegis.

Skipanin verður royndarkoyrd á peningastovnunum í løtuni og á Elektron, sum letur skipanina til peningastovnarnar.

Saltsiloin skjótt klár

Tann 22. í hesum eru liðin 40 ár síðani salt fyrstu ferð bleiv koyrt í gomlu saltsiloina á vestaru bryggju í Havn. Men gamla siloin bleiv um ólavsøkumundið tikin niður, so pláss kundi verða fyri nýggjari silo.

– Sum kunnugt, so kann salt geva nógvan tering, og nú var so nógvur rustur komin í ta gomlu siloina, at hon trongdi til at verða skift út, sigur Mortan Johannesen, stjóri á Saltsøluni. Tá vit tosaðu við hann, var hann staddur á Ibiza í arbeiðsørindum – á veg til landsdystin millum Spania og Føroyar í morgin.

– Tað bleiv sagt um ta gomlu siloina, at hon var so illa farin at vandamikið var at vera inni í henni. Men ikki veit eg, tí tá teir byrjaðu at taka hana niður fyri ólavsøku, skuldi tað taka stutta tíð, men bleiv kortini nógv drúgvari arbeiði enn væntað.

Tá gamla siloin varð tikin niður, varð beinanvegin farið undir at gera nýggja silo. Tað er Tórshavnar Havn, sum stendur fyri arbeiðnum, og Saltsølan skal síðani í fyrsta umfari leiga nýggju saltsiloina í fyggju ár.

– Sum eg havi skilt tað, verður nýggja siloin klár at taka í brúk um mánaðarskiftið november-desember, men tá skuldu vit eisini havt eina góða silo sum avloysara fyri ta gomlu, sum hevur tænt fyri seg í 40 ár, sigur Mortan Johannesen.

– Vit hava nóg mikið at gera, men kappingin er hørð, tí aðrir royna at sleppa inn á marknaðin við dumpingprísum. Enn eru vit størstir á marknaðinum, og tað eru vit í kraft av, at vit kunnu lata bestu dygdina á saltinum.